## Kerviel fingið arbeiði

Umdømið er ikki altíð avgerandi, tá ein skal søkja starv, og tað kann í hvussu er fransmaðurin Jérome Kerviel vera fegin um. Í fjør bleiv hann avdúkaður og tikin fyri at hava kostað franska stórbankanum Société Générale 36 milliardir krónur, men hóast tað hevur hann nú fingið annað starv. Blaðið Le Points veit at siga, at Jérome Kerviel arbeiðir hjá einari KT-fyritøku. Tað er ógreitt, um Société Génárale fer at krevja sínar pengar aftur.



*Hóast heimskendur fyri svik fekk Jérome Kerviel nýtt arbeiði*

*Mynd: TV2*

## Børnini eiga framtíðina

Tey, sum hava tikið seg saman at skipa býráðsmeiriluta í teirri nýggju Eystur-Vestur kommununi í Grønlandi frá ársskiftinum, skrivaðu í gjár undir eina avtalu, sum skal varpa ljós á børnini og teirra kor. Asii Chemnitz Narup, sum verður fyrsti borgarstjórin í nýggju kommununi, sigur við KNR, at avtalan er ein boðskapur um, at kommunan ætlar sær at loysa trupulleikarnar hjá børnunum og foreldrum teirra, og at hetta er ein stór uppgáva.

# Hjálp børnum móti pedofilum



*Arnbjørn Fagraklett er sjálvur misbrúktur sum barn, og tí tosar hann út frá egnum beiskum royndum*

**Øll tosa um tey bleytu virðini, og hvat er meira bleytt enn okkara børn? Men føgur orð er ikki nóg mikið. Pengar skulu til, skulu vit hjálpa okkara børnum móti pedofilum, sigur Arnbjørn Fagraklett, ið sjálvur varð misnýttur sum barn**

MISNÝTSLA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Arnbjørn Fagraklett og tvær kvinnur, sum eisini eru misbrúktar sum barn, ferðast í hesum døgum kring landið saman við ágangur.com, ið er felagið, sum B36 hevur stovnað í sambandi við teirra átak »vigt eru ímóti kynsligari misnýtslu av børnum« og KRIS.

Endamálið er at vitja ítróttafeløgini í landinum og har upplýsa um kynsligan ágang móti børnum.

Arnbjørn Fagraklett var sjálvur gjøgnum mong ár misnýttur sum barn, og tosar tí út frá egnum royndum.

- Tað gongur nógv slíkt fyri seg í Føroyum, og tað er alneyðugt at vit gera nakað fyri steðga misnýtsluni. Men politikarar siga bara føgur orð og lova meiri pening næstu ferð, og tað er ikki nóg gott, tí vit hava brúk fyri pengunum nú. Eingin veit, um KRIS yvirhøvur er til, tá næsta fíggjarlóg kemur fyri, sigur Arnbjørn Fagraklett.

Hann er serliga vónbrotin av nøkrum fáum politikarum, tí hesir greitt hava meldað út, at KRIS fær ongar pengar á fíggjarlógini fyri í ár, men kundu næstan tryggja, at peningurin kemur á næstu fíggjarlóg.

- Eg veit at KRIS hevur søkt um 1,6 milliónir krónur, og tað mátti ikki verið ov nógv tá hugsað verður um, hvussu týdningarmikið arbeiðið er, sum KRIS ger. Tær 200.000 krónurnar, sum felagsskapurin fær, røkka ikki langt, sigur Arnbjørn Fagraklett.

Hann vísir til, at KRIS hevur neyðuga førleikan at taka sær av misbrúktum børnum. Eisini hóast sálarfrøðingar vilja siga tað mótsatta. Um tað so kann vera ein orsøk til, at politikarar eru trekir at játta pengar til arbeiðið.

### 20% misbrúkt

KRIS er sjálvboðin felagsskapur sum er stovnaður fyri at hjálpa insestofrum og misbrúktum børnum, og øll ásanna, at felagsskapurin ger eitt stórt og munagott arbeiði. Men tað slítur upp á fólk at fáa alla hesa vitan um, hvussu pedofil misbrúka børnini, og tí eru fleiri fallin frá.

- Tað, sum vit í veruleikanum hava brúk fyri, er 24 tíma vakt. Og tað sigur seg sjálvt, at tað ber ikki til hjá sjálvbodnum, har mugu fólk lønast, sigur Arnbjørn Fagraklett.

Sálarliga strongdin, sum børn koma undir, er so øgilig, at tey merkjast fyri lívið. Ella tey flestu í hvussu er. Tí er arbeiðið hjá KRIS so ógvuliga týdningarmikið.

- Mítt lív hevði ikki verið tað sama, hevði eg ikki fingið hjálp, so eg veit, hvat eg tosi um. Og tá vit samstundis vita, at 20% av børnunum í Føroyum verða misnýtt, so mugu øll skilja, hvussu týdningarmikið tað er at vit fáa neyðugu játtanina á fíggjarlógini, sigur Arnbjørn Fagraklett.

Tað er av alstórum týdningi at steðga teimum pedofilu, tá tey steðga ikki við eitt barn, men halda fram at misbrúka barn eftir barn.

- Og tað eru ikki bara mannfólk, sum misbrúka børn. Konufólk eru akkurát líka ring í so máta. Fólk halda automatiskt, at tað eru mannfólk, tosað verður um, tá tosað verður um pedofil, men tað er bara ikki so, sigur Arnbjørn Fagraklett.

Hann sigur eisini, at tey pedofilu sum oftast eru av allarfittastu fólkum, og tí ring at vara seg fyri.

- Tí er tað so týdningarmikið, at vit fáa pengar at arbeiða við og ikki bara vøkur orð frá politikarunum, sigur Arnbjørn Fagraklett.



*Gvøðbjørg West er forkvinna og okkara fremsti autoritetur innan barnamisbrúk*

## Minst 10. hvørt barn misbrúkt

**- Vit halda okkum til 10. hvørt barn, sum verður misbrúkt, men talið er allarhelst væl hægri, sigur Gvøðbjørg West, forkvinna í KRIS**

MISBRÚK

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hagtølini vísa, at í minst trimum av fýra dømum um kynsligan ágang móti børnum er talan um fólk, sum børnini kenna og hava álit á.

Og kynsligur ágangur móti børnum hendir mundandi oftari enn vit geva okkum far um. Sambært Gvøðbjørg West, forkvinnu í KRIS, verður 10. hvørt barn í Føroyum útsett fyri kynsligum ágangi. Men, sum hon tekur til: Tað er bara toppurin av ísfjallinum!

- Og slíkt hendir ikki bara í disfunktionellum familjum. Hetta hendir so væl í vertsligum sum andaligum familjum, sigur Gvøðbjørt West, sum helst man vera fremsti autoritetur innan barnamisbrúk í Føroyum.

Hon sigur, at tey í KRIS hava ynski um at upplýsa øllum viðkomandi stovnum um vandan við misbrúki av børnum, men tað er alneyðugt, at politikarar viðurkenna hendan vandan og seta pening av til at hjálpa misbrúktu børnunum.

- Vit hava ynski um at vitja skúlar og barnagarðar og ítróttarfeløg fyri att upplýsa um vandan av misbrúki, men tað krevur at vit fáa neyðuga peningin, sigur Gvøðbjørg West.

Og at tørvurin er til staðar prógva mongu uppringingarnar, sum felagsskapurin fær.

- Í november í fjør, tá vit høvdu fund við politikararnar, fingu vit 187 uppringingar, sms og mailar. og bara í gjár vóru tað fimm fólk sum ringdu til okkum. So tørvurin er eyðsýndur, sigur Gvøðbjørg West.

Men hon sigur eisini, at KRIS í dag er á einum vegamóti.

- Spurningurin er, um vit halda fram, ella vit pakka saman, sigur forkvinnan í KRIS.

Alt arbeiði í felagsskapinum er sjálvboðið, og higartil hava tey stovnað tríggjar serbólkar. Ætlanin er somuleiðis at skipa fyri einum kvøldi um mánaðin fyri avvarðandi at misbrúktum.

- Tess meiri vit varpa ljós á spurningin, tess fleiri fólk venda sær til okkum, sigur Gvøðbjørg West.

Hon sigur somuleiðis, at felagsskapurin hevur neyðuga førleikan at hjálpa fólki við bæði sálarfrøðingum og familjuráðgevarum. So nú vantar bert, at politikarar virðismeta arbeiðið, KRIS ger, og letur teimum neyðugu játtanina at veruliga hjálpa, har tað ræður mest um.